## Til minnis um Brynhild Hansen, Norðragøtu

### f. 1.5.1920 - deyð 17.11.2006

Tað er eitt sindur undarligt at sita í Danmark og skriva minningarorð um Brynhild. Tað kom eitt sindur dátt við at hoyra, at Brynhild var deyð, sjálvt um heilsan ikki hevði verið so góð í seinastuni.

Góða Brynhild. Eg, mamma og systkin míni hava nógv at takka tær og Hans fyri. Hans doyði tíðliga longu í 1985. Vit búðu síð um síð, so vit høvdu nógv saman, og tað var bara gott. Gekk man uttanfyri, og stóð Brynhild í vindeyganum, var hon skjót út á trappuna og spurdi, um vit ikki komu inn. Tað, sum var so stuttligt við Brynhild, var, at hon var so góð og mild, altíð við tí góða og positiva. Man hoyrdi, hvussu nógv hon helt av børnunum, og so vildi hon hava at vita, hvussu vit høvdu tað. tað munnu vera mong, sum hava fingið ein góðan drekkamunn frá Brynhild.

Vit búðu í Havn í nógv ár, áðrenn vit fluttu til Danmarkar at búgva. Siti og minnist gamlar dagar í Gøtu, tá vit komu at vitja mammu og pápa, og børnini vóru smá og lógu í vogni. Tað var ongantíð nakað í vegin fyri at



lata tey standa uttanfyri í vogninum. Brynhild hevði ein lítlan urðagarð, og har var Brynhild í nógvar tímar tilsamans og sjálvt um stykkið ikki var so stórt, fekk hon nógv burturúr. So plagdi Brynhild at siga við meg: »Eg skal nokk hyggja eftir vogninum. Eg eri her kortini«.

Ja, góða Brynhild. Eg fari at sakna teg, tá eg komi heim. Tað var so deiligt at síggja teg, og sjálvt um tú ikki hevur búð heima í nøkur ár, sóust vit av og á kortini. Tú treivst væl í Gøtubrá. Tú hevði børn, svigarbørn og ommubørn rundan um teg, og tú var stolt av teimum øllum. Tú tosaði altíð um tey, og tú var ein góð mamma og omma at eiga.

Marita góða. Tú og genturnar vóru so nógv knýttar at mammu og ommu tykkara, og tit vóru so nógv at síggja heimi hjá henni. Góðu tit Líggjas, Torkil, Sjúrður, Eyðun og Marita. Tit hava mist eina góða mammu. Hon var ein góð mamma at eiga. Tit mistu pápa tykkara í góðum árum. Góðu tit øll. Saknurin er stórur hjá tykkum, tað veit eg, men eg vil enda við at skriva. Friður verði við minninum um okkara góðu grannakonu Brynhild Hansen.

**Joan Joensen**

## Birtha Eysturoy

### Heilsan til mammu á 60 ára degnum

***Mamma tú hevur lært okkum:***
*at gera okkara besta*
*at lívið er ein gáva*
*at gera lekrastu oksasteik í verðini*
*at æra mann sín*
*at gleðast í at eldast*
*at hugna sær einsamøll*
*at verða ein betri mamma*
*at dansa*
*at góðtaka onnur*
*at kærleiki kann vinna á øllum*
*at klandur loysir einki*
*at fáa morgunmat, døgverða og nátturða á klokkuslett*
*at fáa ein ringan feittblett úr einum plaggi*
*at leggja buksur upp*
*at gera buding*
*at familja er tað dýrabarasta ein hevur*
*at hava ein góðan bonk í køkinum til kaffigestir*
*at arbeiða í havanum um summarið-sjálvt á miðjari nátt*
*at klippa frunt*
*at vera til tíðina*
*at gera Dallas køku*
*at takka Gudi fyri dagin*
*at fara á seiðaberg er heilsubót*
*at mammur altíð hava rætt*
*at góð vinarbond við grannar eru umráðandi*
*at ein nýtist ikki neglalakk og mascara fyri at síggja gott út*
*at ringja og siga frá hvar man er*
*at ein er ongantíð ov gomul at læra nakað nýtt*
*at eitt gott klem kann gera undurverk*
*at Omega breyð er best at byrja dagin við*
*at tað er ílagið at grilla á trappuni tá tað er kolandi stormur*
*at ein skal hava eina skuffu við leikutoy inn í køkinum*
*at ein ger alt fyri síni børn*
*at ommur gott kunnu eiga Playstation*
*at frisørar kunnu ganga í tuflum*
*at ein láturkrampi er góð heilsubót*
*at koyra buksurnar í hosurnar áðrenn ein fert í gummilstilvarnir*
*at vera spontan*
*at síggja signingar í tí smáa*

*Mamma takk fyri*
*At tú hevur vegleitt okkum*
*At tú í okkara hjørtum var vakrari enn Krystle í Dollars*
*At tú hevur verið okkara fyrimynd*
*At tú ert verðins besta omma*
*- og mamma.*

**Rannvá og Sunva**

# Føroyskt KT út á europeiska marknaðin

**Fýra føroyskar fyritøkur eru við í fyritøkuni Munk IT, sum nú ætlar sær við KT-skipanum út á tann europeiska marknaðin. Hesar fyritøkurnar eru EikBanki, Tryggingarfelagið Føroyar, Føroya Tele og Formula.fo.**

KUNNINGARTØKNI
*Snorri Brend*

Felags fyri allar íleggjararnar, sum allir eiga part í móðurfelagnum Formula International undir leiðslu av Torkili Holm Petersen, er eitt felags ynski: At skapa ein stóran europeiskan veitara av Microsoft-baseraðum forrætningsskipanum til smærri og miðalstórar fyritøkur.

SMB-partnarastjórin hjá Microsoft, Bo Martinsen verður stjóri í fyritøkuni, meðan forstjórin í Munk IT verður stjóri fyri arbeiðið í Danmark.

- Her í Danmark síggja vit nú skapið av eini nýggjari altjóða fyritøku, við røtum í Norðurlondum. Vit broyta spælireglurnar í bransjuni, tí hinir stóru Microsoft-veitararnir av forrætningsskipanum hava ikki víst SMB-marknaðinum nóg stóran áhuga.

- Hetta broyta vit nú, til gagn fyri kundarnar, Microsoft og menningina á marknaðinum, sigur fyritaksstjórin Bo Martinsen.

Keypsprísurin er ikki kunngjørdur. Eftir ætlan verður handilin góðkendur á aðalfundi í Munk IT, sum verður 23. apríl.

Um einar 14 dagar ella so verður navnið á nýggju fyritøkuni kunngjørt.

# Føroya Banki lænir 1.2 mia. krónur

Føroya Banki undirskrivaði mikudagin lánsavtalu við 21 útlendskar peningastovnar á føroysku sendistovuni í London, skrivar bankin í tíðindaskrivi. Bayerische Landesbank, Danske Bank og HSH Nordbank hava fyriskipað lánið, sum er 155 milliónir evrur ella knappar 1,2 milliardir krónur til støddar.

Upprunaliga varð lánið útboðið sum eitt 3-ára syndikerað lán upp á 75 milliónir evrur, men áhugin fyri láninum var so stórur, at tað varð yvirteknað við meira enn 100 prosentum.

Føroya Banki økti útlánini í 2006 við 1,3 milliardum krónum. Við nýggja altjóða láninum er gjaldførið styrkt munandi, so bankin kann halda fram at vaksa.

- At 21 útlendskir peningastovnar játta at veita Føroya Banka hetta lánið, ber týðiligt boð um, at álitið á bankan á altjóða lánimarknaðinum er sera stórt. Styrkta gjaldførið skal nýtast til at menna Føroya Banka uppaftur meira, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, í tíðindaskrivi.

Í sambandi við undirskrivingina á føroysku umboðsstovuni í London vóru møtt umboð fyri 17 av teimum 21 útlendsku peningastovnunum. Føroyski sendimaðurin, Sigmundur Isfeld, og danski sendiharrin, Birgir Riis-Jørgensen, vóru eisini til staðar.

Fyri Føroya Banka undirskrivaðu Janus Petersen, forstjóri, og Súni Schwartz Jacobsen, stjóri, lánsavtaluna.

## Andlát og jarðarferðir

**Harry Petersen, Sørvágur**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 20. mars 82 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Sunnvá Háberg, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósmorgunin 22. mars, 89 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Erling Olsen, búsitandi í Køge**, andaðist mikudagin 21. mars á Roskilde sjúkrahúsi, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Køge kirkju leygardagin 24. mars klokkan 11.

Kistan við **Thorvald Thorsteinsson, Tvøroyri** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í kirkjuna fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður Tvøroyar kirkju leygardagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið minnast Thorvald kunnu lata eina peningagávu til Ellisheimið á Tvøroyri. Konto í Eik.